## 200 og Gestir í Losjuni við Gøtugjógv

Nú leygarkvøldið 20. august kl. 22.00 spæla 200 og Gestir, í Losjuni í Gøtu. Superaktuellu punkararnir 200 og rokk-droymararnir í Gestum, fara hvør í sínum lagi at borðreiða við egnum tónleiki og bjóða áhoyrarunum eina spennandi og fjølborytta tónleikaupplivíng.

200 hava seinasta árið staðfest sína støðu sum nógv tann best dámdi rokkbólkurin í landinum. Við útgávuni »Viva La Republica!« kom nógvur vindur í seglini og við eini røð av framúr væleydnaðum konsertum, á MjúS, Vestanstevnu og G! er eingin í iva longur, um at 200 er harðast rokkandi bólkurin vit eiga í løtuni.

Prixvinnararnir frá 2003 Gestir, sum eisini vóru at hoyra á G!, hava seinastu mánaðirnar arbeitt dúgliga og miðvíst við nýggjum og eldri tónleiki. Teir hava eins og 200 spælt á fleiri festivalum og konsertum.

**nud**

## Gestir burtur frá toftunum

Gestir fara í september í Lundgaard upptøkuhølið at spæla sína fyrstu fløgu inn. Fløgan fer at eita »Burtur frá Toftunum«. Gestir vóru í Lundgaard Studio í fyrra árið og gjørdu nakrar upptøkur. Tær upptøkurnar vóru vinningur í Prix Føroyar kappingini.

Upptøkan kemur eftir eitt langt summar, har bólkurin hevur luttikið á MjúS, G! og øðrum konsertum, umframt at teir hava arbeitt miðvíst við at gera tónleik til fløguna. Til ber at hoyra Gestir í Losjuni við Gøtugjógv í annað kvøld og til AME í Vega 27. august.

Lundgaard Studio liggur í Vejen og áður hava bólkar sum Taxi, Deja Vu og 200 tikið upp ella ljóðblanda í upptøkuhølinum, sum eru nøkur av teimum bestu í Danmark.

**nud**

## Guðrun Sólja á Mini Aqpik Jam

Eins og 200 var Guðrun Sólja á Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum í apríl vald at spæla á einum tónleika festivali í Grønlandi. Eins og Nipiaa Rock Festival, liggur Mini Aqpik Jam í býnum Aasiaat.

Hesin festivalur er dagarnir beint undan rokk festivalinum 29.-31. august, og er ein familjuvinarligur popfestivalur, Nipiaa er meira rokkkendur, og verður hildin 1.-3. september. Flux og Clickhaze hava fyrr spælt á Nipiaa festivalinum. Ætlanin var, at eisini Eivør skuldi luttaka á Mini Aqpik Jam, men tað lá tíanverri ikki fyri.

**nud**

P/F Stubbin, Kvívík:

# Framsýning av kampingvognum og bátum



*P/F Stubbin í Kvívík hevur í hesum døgum eina framsýning av kampingvognum, bátum og navigatiónsútgerð við Oyggjarvegin í Havn. Á myndin er Kári Hansen frá Stubbanum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**P/F Stubbin í Kvívík hevur í hesum døgum eina framsýning av kampingvognum, bátum og navigatiónsútgerð á økinum hjá Reyni Service við Oyggjarvegin í Havn**

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan 12. mai í ár hava Ann Vilhelmdóttir og Kári Hansen í Kvívík rikið sína egnu fyritøku, P/F Stubbin, sum selur og útleigar kampingvognar, trailarar og bátar, umframt sølu av framkomnari navigatiónsútgerð.

Hesa vikuna hevur fyritøkan eina framsýning av tí sum tey selja og útleiga á økinum hjá Reyni Service við Oyggjarvegin í Havn.

Á framsýningini eru fleiri Örnvik frítíðarbátar í ymiskum støddum og prísklassum. Örnvik bátarnir eru upprunaliga svenskir, men í dag verða glastrevjaskrokkarnir stoyptir í Póllandi. Bátarnir, ið eru ES-góðkendir, fáast í nógvum ymiskum støddum og prísklassum – frá kr. 100.000,- og upp eftir.

Hugskotið er at keypa bát og vogn saman. Nógvastaðni í landinum er tað sera ringt – um ikki heilt ógjørligt at fáa pláss til at leggja ein bát, tí er hetta ein góður møguleiki við at hava bátin standandi á vogninum, so kann man taka hann við sær til hús, sigur Kári Hansen frá Stubbanum.

Stórur áhugi er bæði fyri at keypa og at leiga vognar og bátar, sigur Kári, sum gjarna koyrir vognin ella bátin har kundin ynskir tað – alt eftir avtalu.

Stubbin umboðar kampingvognar av merkinum Hobby, Mercury motorar, og Garmin navigatiónsútgerð til bæði bátar og bilar.

Framsýningin við Oyggjarvegin verður opin til og við leygardagin 20. august.

# Göran og Anitra koma í dag

**Vitjanin hjá svensku forsætisráðharrahjún um byrjar í dag**

VITJAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag koma svenski forsætisráðharrin Göran Persson og frú Anitra Steen á almenna vitjan. Forsætisráðharrahjúnini lenda í Vágum klokkan 15.50, har løgmaður Jóannes Eidesgaard og frú Anita Eidesgaard taka ímóti.

Av flogvøllinum verður koyrt til Oyragjáar, haðani siglt verður fram við Vestmannabjørgunum til Klaksvíkar. Í Klaksvík taka borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen og frú Sunnuva Jacobsen ímóti. Vitjað verður á Kósini, har forsætisráðharrin og frú fáa møguleika at kunna seg við føroyskt vinnulív.

Klokkan 19. eru løgmaður og Klakvsíkar býráð vertar við døgurðan, ið verður í Skálanum.

Leygarmorgun verður farið til Suðuroyar, har gingið verður í Hvannhaga.

Á middegi fara løgmaður og Göran Persson at hava ein arbeiðsmorgunmat í Norðurlandahúsinum. Klokkan 13.30 verður vitjað í Listaskálanum, og klokkan 14 verður fundur við Javnaðarflokkin í Miðlahúsinum. Á leið klokkan 14.25 fer forsætisráðharrin at hava eina framløgu, har eisini sviar, búsitandi í Føroyum, og pressan er boðin við at lurta.

Kl. 15.20 verður møguleiki hjá pressuni at seta forsætisráðharranum og løgmanni spurningar.

Sunnumorgunin klokkan 10 hittir Göran Persson ríkisumboðið Søren Christensen. Klokkan 10.30 verður vitja á Reyni og í Tinganesi.

Almenna vitjanin hjá svenska forsætisráðharranum og frú, endar um middagsleitið, tá farið verður úr aftur Vágunum.